# Hjálp til børn sum fá skilja

**– Hvussu hjálpa vit børnum við empati-órógv, og sum ikki eru sum onnur, og sum ikki kunnu seta seg inn í, hvat onnur føla og hugsa? Henda spurningin fer svenskur yvirlækni at geva sítt svar uppá í næstum á skeiði í Føroyum**

SKEIÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Christopher Gillberg er vælkendur úti í heimi fyri vitan sína um barnapsykiatri. Nú fáa føroyingar eisini gleði av hesum*

**Empati-órógv:** Tú sært tað beinanvegin á hesum børnunum, at okkurt er ikki sum tað eigur og skal.

Í barnagarði og í skúlagarði skilja tey seg burturúr mongdini, hóast tey hava sínar gávur.

Trupulleikin hevur verið, at okkurt er áfatt við hesum børnunum. Men samstundis hevur ikki verið lætt at seta orð á, hvat bagir teimum.

Ein teirra sum tó veit nógv um júst hetta evnið og sum fegin býtir út av vitan síni er yvirlæknin Christopher Gillberg úr Svøríki.

Hann hevur hildið nógvar fyrilestrar um hetta evnið og hevur skrivað í hópatali av bókum og greinum. Og nú kemur hann so hendavegin at halda skeið.

Skeiðið verður í mars mánaði og er ætlað fakfólkum sum arbeiða júst við hesum barna- og ungdómsbólkinum, eins og foreldrum og avvarðandi.

### Staðfesta sjúku

Við drúgvu royndum sínum innan barna- og ungdómspsykiatri hevur Gillberg gjørt sær sínar hugsanir um tað, sum á fakmáli kallast empati-órógv.

– Felags eyðkenni fyri hesi børnini er, at tey hava ringt við at seta seg inn í, hvat onnur bæði hugsa og føla, sigur hann.

Hetta er eisini útgangsstøðið fyri skeiðnum. Tí, sambært Gillberg so er empati-órógv ein felagsnevnari fyri fleiri psykiatriskar sjúkur, sum t.d. Asperger, autismu, Tourettes syndrom og anorexia.

Á skeiðnum fer Gillberg at geva luttakarunum nøkur amboð soleiðis at ein kann staðfesta empati-órógv.

Somuleiðis verður eisini víst á, hvussu ein kann hjálpa hesum bólkinum við trupulleikum sínum.

### Altjóða viðurkendur

Christopher Gillberg er professari í barna- og ungdómspsykiatri, og starvast sum yvirlækni á barnaneuropsykiatrisku klinikkini á Gøteborg Universitet.

Hann hevur skrivað meiri enn 400 vísindaligar greinar, harav tær flestu eru prentaðar í altjóða tíðarritum. Umframt hetta hevur hann útgivið 10 lærubøkur innan barna- og ungdómspsykiatri.

Gillberg hevur eisini fingið fleiri altjóða viðurkenningar fyri sína gransking um sambandið millum heilavirksemi og atburð. Og tað er í einki at taka seg aftur í, at hann er ein kapasitetur innan hetta økið.

Hann ber eisini orð fyri at vera ein spennandi fyrilesari. Tað er júst hetta sum føroysku skeiðluttakararnir fara at fáa gleði og gagn av í mars mánaði.

## Savna pening til nýggja kirkju



*Hoyvíkar kirkja verður væntandi liðug komandi ár*

**Hoyvík:** Í mong ár hevur verið tosað um bygging av eini kirkju í Hoyvík. Og nú er so av álvara komin gongd á hetta málið.

Í vikuni varð skriv sent út í húsini í høvuðsstaðnum við áheitan um at stuðla hesi bygging í eitt ávíst tíðarskeið.

Kirkjuráðið og bygginevndin hava sett seg í samband við fyritøkur og grunnar, og nú eisini til kirkjufólkið í Suðurstreymoy.

Grundarsteinurin varð lagdur 20. juni í fjør, og er sáttmálði skrivaður um reising og innilokan av kirkjuni. Gongur sum ætlað kann kirkjan verða vígd og tikin í nýtslu komandi ár.

**sb.**

## Fara at syngja sunnukvøldið

**Hoyvík:** Sunnukvøldið skipar samkoman Oasan fyri spennandi sangtiltaki við nógvum bólkum og einstaklingum.

Millum hesar sangbólkar eru tær so vælkendu Annika & Sigrið, sum fara at syngja saman við gentunum.

Menninir sleppa eisini upp í part, tá Steintór Hjaltalin, Harald Haraldsen, Jógvan Lamhauge og Tórbjørn Láadal fara at syngja saman.

Annika við Skipá fer aftur á pallin hetta kvøldið, og verður hetta gjørt saman við Tórbjørn Láadal. Og fólk kunnu so eisini gleða seg at hoyra Hans Jacob á Lava syngja nakrar sangir.

**sb.**





# Skrivstovuhøli ynskjast til keyps ella til leigu

Fyri ein av kundum okkara, eitt nýtt felag við fíggjarliga tryggari bakgrund, søkja vit eftir egnaðum skrivstovuhøli til leigu ella til keyps. Hølini skulu liggja væl fyri miðskeiðis í Tórshavn og við eini støðd millum 200 og 600 fermetrar.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Jens Wang á teldupost jwa@faroe-law.fo ella við at ringja 35 99 00.

FAROE
LAW

Tróndargøta 19 · P. O. Box 1218 · 110 Tórshavn · Tel 35 99 00 · Fax 35 99 01 · www.faroe-law.fo



**Bakaralærlingur** søkist til Mylnuna



Ert tú morgunfrískur ella -frísk og hevur hug til eitt gott og spennandi arbeiði, so send eina umsókn til okkum, ella ring. Lærutíðin er 4 ár við skúlagongd í Danmark.

mylnan

Send umsóknina til:
Mylnan, c/o Eirikur Magnussen, Box 1059, 110 Tórshavn, ella ring til Eirikur á tel 214456.